Mentanarinnrás í Vágum

Fasta sambandið um Vestmannasund hevur sett Vágar í miðdepilin mentanarliga. Seinasta vikuskiftið bar prógv um so at siga óavmarkaðu møguleikarnar, sum nú eisini umfata Vágar.

Áskoðarar og áhoyrarar frá Gjógv, Selatræ, Saksun og Kirkjubø og øllum búplássum innan henda kringin fingu høvi at uppliva tónleik og sjónleik á høgum listarligum stigi saman við vágafólki í Vágum.

Leygardagin byrjaði Vágakórið við várkonsert á Giljanesi. Um kvøldið framførdi Havnar Sjónleikarfelag Mammusa gras í skúlanum í Miðvági. Og sunnudagin var stórfingin fiólkonsert og upplestur á Giljanesi.

Konsertin hjá Vágakórinum var sum heild væleydnað. Fólk høvdu kanska væntað eina longri og meira fjøltáttaða skrá hjá kórinum sjálvum, men Martin Pollard, pianistur fekk høvi at hava part av skránni at spæla nakað av tí, sum hann fyri stuttum hevur spælt yviri í Australiu.

Sjónleikurin í skúlanum í Miðvági fær sera góð ummæli. Ikki minst eru áskoðararnir glaðir um, at skúlahøllin veruliga kann húsa framkomnari leiklist. Oyggin hevur fyri neyðini góðan pall til júst leiklist, og lítið er at ivast um, at pallurin í Miðvágs skúla í framtíðini kann gerast miðdepil fyri leiklistini, bæði á lokalum grundarlag og fyri alt landið. Sjálvsagt skulu ymsar ábøtur gerast, men ikki størri enn so, at bæði peningarpungurin hjá kommunui og skúlin tola tað. Ja, fyri báðar partar verður tað bert stórur vinningur.

Á Giljanesi hava vágafólk eina sera góða konserthøll, sum ætlanir eru um at pussa upp og gera hugnaliga til alføroyskar konsertir á høgum musikalskum stigi.

Orfeus konsertin sunnudagin var ein slík konsert. Listarfólkini vóru teir tríggir Sámal Petersen, violinspælari og sera dugnaligi næmingur hansara, Jón Festirstein og so Páll Danilesen, sjónleikari.

Teir spældu Bach, Blakk, Sunleif Rasmussen, Kára Bæk, Edvard Nyholm Debes og Alan Ridout.

Tað var tóðiligt at fólk nutu løtuna. Onkur sat og neyt myndina hjá Ingálvi av Reyni, meðan tónarnir úr Partititu nr. 3 E-dur hjá Bach á violinini hjá Sámali Petersen fylti rúmið. Teir tríggir partarnir hóskaðu júst til tær tríggjar kvinnurnar, Ingálvur setti á løriftið fyri góðum tríati árum síðan.

Echoes of the Past hjá Sunleifi Rasmussen er frá 1992. Hetta er spennandi verk, sum eg kundi hugsað mær krevur ein góðan violinspælara sum Sámal, um tað veruliga skal koma til sín rætt. Tað er tóðiligt at Bach og Sunleif eru ikki úr sama musikalska skúla, men spennandi eru báðir á hvønn sín hátt.

Duo hjá Kára Bæk er eitt sera vakurt verk, sum Sámal og Jón leikandi lætt og vakurt bóru út í salin. Serstakliga hugtakandi var at uppliva, hvusuu væl lærari og næmingur vóru samanspældir.

Bøhmerlands drotning frá 1991 hjá Kristinai Blak var nakað fyri seg. Tú væntaði at fáa okkurt kvæðakent, men eg fann onga kvæðastrofu. Men tá tú vart sloppin úr kvæðasporinum, tú leitaði eftir, so kundi tú sita og liva við í skiftiliga tónleikinum úr gomlu violinini frá 1700 talinum.

Páll Danielsen las nú yrkingina hjá Hans Andeasi Djurhuss um piltin og reiðrið, sum Edvard Nyholm Debes hevur tema við variatiónum um (1997). Hetta stykkið dámdi mær serstakliga væl.

Seinast komu sjónleikarin og vilinspælarin á pallin at lesa upp og spæla Tarvin hjá Alan Ridout. Hetta er søgan um fitta tarvin, sum heldur vildi njóta angan av blómunum enn at berjast.

Jú, jú lukkulig gjørdust teir føroyingar, sum leitaðu sær andaliga føði vesturi í Vágum vikuskiftið 10. og 11. mai 2003.

H.J.

Myllan í Kúrdali reist

FORNMINNI
Tíðindaskriv

Týsdagin í síðstu viku varð lítil hátíðarløta í Kúrdali í Hoyvík í sambandi við, at nýggja myllan hjá Føroya Fornminnissavni varð reist.

Tað er Arngrím Árting frá AM-smíð,ið hevur gjørt timburarbeiðið.

Tað var sama virkið, sum í fjør stóð fyri at gera yvirtrom og flagtekjuna á neystið niðri á støðni í Hoyvík.

Myllan er reist eftir tekningum av Mayfinn Norðoy, arkitekti á Føroya Fornminnissavni. Hon er gjørd eftir somu flatmynd sum myllan í Kunoy. Annars eru tekningarnar gjørdar eftir 100 ára gomlum fotomyndum og upprunastøði.

Myllusteinar og kvarnkallur til mylluna eru eisini varðveitt.

Myllan stendur niðarlaga í Kýrdali og til ber hjá fólki at koma og sígggja hana og tað gamla handverkið, sum brúkt verður í hesum smiðnum.

Ætlanin er seinni at klæða mylluna og gera innviðin, soleiðis at hon kann standa liðug komandi summar.

Esmar og skótin á palli

UNDIRHALD
Tíðindaskriv

Nú verður Esmar Eysturoy aftur at síggja á palli. Norðurlandahúsið verður 11. juli karmur um framførslurnar, har vit eisini hitta skótan í Bø og hini, sum vit kenna frá Pipari og Salti

11. juli verður Norðurlandahúsið karmur um eitt brak av eini framførslu, tá Skótin í Bø, Esmar Eysturoy, Kalle Mohr, Kári Cool og øll hini í Pipar & Salt aftur fara á pallin við nýggjum tilfari.

Pipar & Salt hava farnu árini verið at sæð í sjónvarpinum og hava undirhildið á privatum veitslum, men tað eru sjey ár síðani, at teir høvdu veruligar framførslur í Norðurlandahúsinum og í ítróttarhøllini á Nabb.

Sølan av atgongumerkjum til framførsluna 11. juli er longu byrjað. Tey fáast í Kunningarstovuni í Havn.

Lýsing av umhvørvisgóð kenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 13. mai 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

P/F Strandamáling á Strondum

Góðkenningin liggur alment frammí á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis sígggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo .

Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Viðvíkjandi P/F 1829, P/F Kaleideskop í likvidatión, 100 Tórshavn

Vísandi til § 72 í " Lov om Aktieselskaber" frá 15. apríl 1930, skal Skráseting Føroya við hesum, heita á nevndina/likvidator í omanfyri nevnda felag, sum fór í likvidatión 6. apríl 1993, um innan 3 mánaðar frá í dag at upplýsa um felagið enn er til. Um Skrásetingin einki hevur frætt tá henda freist er farin, verður felagið strikað úr Skrásetingini.

Skráseting Føroya 12. mai 2003
Kristin Balle

Lesið Sosialin

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

NISSAN PATROL
Nissan Patrol til sølu – árg. 96.
Tlf. 227989

YNSKIST
Ford 1.8 diesel motorur við ella uttan turbo ynskist til keyps.
Tlf. 281421

TIL SØLU
Eykalutir til Honda Accord frá 87-89, 2 hurðar aftan, baklúka og motorur bíliga til sølu.
Tlf. 252623

VW POLO TIL SØLU
Vælhildin VW Polo frá '98 til sølu um hóskandi boð fæst. Píkadekk fylgja við. Ring
Tlf. 21 93 03

VW POLO TIL SØLU
Vælhildin VW Polo frá '98 til sølu um hóskandi boð fæst. Píkadekk fylgja við. Ring
Tlf. 21 93 03

SUMMARDEKK TIL SØLU
Michelin Energy – óbrúkt 4 stk. 175/70 R 14T 1900 kr. 4 stk. 175/65 R 14T 2000 kr.
Tlf. 421390 ella 214501

FELGUR TIL SØLU
Lítil brúgtar felgur 215/40 "17" . Passa til Honda Acord og Volvo s40 o.a. bílar. 4 Boltar. Nýprísur 13,500, til sølu fyri 7,800,-
Tlf. 506179

FELGUR TIL SØLU
Lítil brúgtar felgur 215/40 "17" . Passa til Honda Acord og Volvo s40 o.a. bílar. 4 Boltar. Nýprísur 13,500, til sølu fyri 7,800,-
Tlf. 506179

OPEL ASTRA 1.4 S
árg. 89, nýsýnaður. Hevur bert haft ein eigara og bara koyrt 73.000 km. Kostnaður 20.000 kr.
Tlf. 257810

EYKALUTIR – HJÁLP
Er tað nakar, ið eigur ein startara til ein Mazda 323 frá 91.
Tlf. 215118

TOYOTA CARINA 2000
árg. 89 til sølu um vit kunnu einast um prísin.
Tlf. 444012 ella 744012

HONDA ACCORD
1.8 LS 39.000 km, árg. 99 til sølu.
Tlf. 443334 eftir kl. 19

SVARTUR VW POLO
Árg. mai 96, 1900 diesel, 65 hestar, koyrt 134.000 km. Summardekk v/sportfelgum og anlegg. Nýsýnaður - ongan kross.
Tlf. 257690

TIL SØLU
Renault 19 frá 11/94 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 210408 ella 522832

SPORTFELGUR TIL SØLU
Sportfelgur til Toyota til sølu. Nýggj dekk eru á felgunum.
Tlf. 225398

SPORTFELGUR TIL SØLU
Sportfelgur til Toyota til sølu. Nýggj dekk eru á felgunum.
Tlf. 225398

JEEPUR TIL SØLU
Ein Hyundai Galopper, árg. 2000, til sølu.
Tlf. 332711

OPEL CORSA JOY
1.4i árg. 94 til sølu.
Tlf. 321367 ella 251690

SCANIA
6 x 2 112 H til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 227462

HONDA CIVIC 1.5 LS
Vtec, árg. 8/98 hevur sportfelgur og vel, til sølu.
Tlf. 253446

RAMBLER CLASSIC 770
árg. 66, 6 syl. km 97423 til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 316372 ella 263707

PEUGEOT 205
árg. 88, nýsýnaður til sølu.
Tlf. 422771 ella 722771

KIA CLARUS
árg. 98, koyrt 43.000 km, alufelgur + píkadekk á felgum til sølu fyri 75.000 kr.
Tlf. 213012

VOLVO 240/45
árg. 86, vinstrahurð framman ynskist til keyps, helst hvít, men annað kann brúkast.
Tlf. 254996 ella 449628

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst er ein BMW 316 I, árg. 97, við 225 x 17" sportfelgum og sóltaki til sølu. Bilurin er í sera góðum standi og vælhildin. Áhugað kunnu ringja
Tlf. 261244

16" SPORTFELGUR
4 stk. 16" sportfelgur + 2 GSD dekk fyri 5000 kr.
Tlf. 222610

EG MANGLI
vinstru hurð til ein Toyota Corolla 1.3 XL model EE 90, árg. 89.
Tlf. 222133

FORD SCORPIO 2.0
árg. 89 við el rútum, sóltaki og floguspælara, bíliga til sølu.
Áhugað ringið 223954

DEKK TIL SØLU
2 stk. lítið brúkt summardekk 195/50-15 til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 216472 ella 316472

MOTORUR
til Ford Escort. Frá mai 91. 1600 EFI. Koyrt uml. 110.000 km, kostnaður 1.500,00 kr
Tlf. 510042

TOYOTA CELICA
árg. 86 2.0 GTI, 150 HK til sølu.
Tlf. 227171 eftir kl. 16

SUMMARDEKK TIL SØLU
Stødd: 175/70 R13. Merki Tyfon, kostnaður 250 kr. stk.
Tlf. 448400 ella 214087

SUMMARDEKK
stødd 185/65 R14. Merki: Tyfon eru sum nýggj. Kostn.: 450 kr. stk.
Tlf. 448400 ella 214087

TIL SØLU
Eykalutir til Toyota Landcruiser HJ 60 motorur, gearkassi, hjelmur, forrútur.
Tlf. 447115 ella 225541

TIL SØLU
Toyota Camry GL 1800, árg. 84. til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 447115 ella 225541

EYKALUTIR
Volvo 240 verður seldur sum eykalutir, ring og gev eitt boð.
Tlf. 226806

TIL SØLU
Nissan Bluebird, árg. 89, í góðum standi. Sýnaður í jan. 2003. Prísur 20.000 kr.
Tlf. 256921 ella 441685

TIL SØLU
4 óbrúktar sportfelgur til Hyundai Acunt. Stødd 195/50R 15.
Tlf. 310512

FORD ESCORT 1.6 CC
frá 06/95. Áhugaði kunnu ringja á
Tlf. 212822

TIL SØLU
Ein Citröen Saxo VTS, árg. 1-11-2002, koyrt 8.000 km. til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 224304 ella 449414

TOPPSTYKKI TIL SØLU
Toppstykki til ein WV 1.6 TD, til sølu.Ein turbo fylgjur eisini við.
Tlf. 211543

MAZDA 626 2.0
Árg. 85 til sølu sum eykalutir. Motorurin er ok. Prísur 2.000 kr.
Tlf. 224450

TOYOTA CARINA II TIL SØLU
Árg. 90, nýsýnaður, í sera góðum standi.
Tlf. 444270 ella 744270

AUDI 80 1.8E TIL SØLU
er í góðum standi, og sær gott út, ongin rustur og hevur nýrenoveraðan motor, sportfelgur fylgja við, og eisini píkadekk , hevur cd-spælara og er nýsýnaður. Er 16 ára gamal, til sølu fyri bert 25.000 kr.
Tlf. 332693 ella 212113

DIESEL STATIONCAR
Nissan Sunny frá 1991. Í góðum standi, við nógvum nýggjum lutum 4 píkadekkum á felgum.
Tlf. 243348 Niels

PEUGEOT 106 GTI
við nógvari eykaútgerð so sum: anlegg, sporfelgur, spylarar, tuningsútstoyt o.a. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 251856

Amboð

ROYTIMASKINUR
4 stk. roytimaskinur á sama aksli. 1 stk. einkult og 1 roytigrýta við allari útgerð í góðum standi, vælegnað til allan fugl, bíliga til sølu.
Tlf. 269106

OPEL OMEGA 1.8i
árg. 90, sýnaður í oikt. 2002, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 424469, e. kl. 18

EIGUR
nakar eina Iris sláimaskinu at selja mær.
Tlf. 441226

PLÁTUBUKKARI TIL SØLU
Scantool plátubukkari, plátubreidd 105 cm., plátutjúgd 1,25 cm., næstan ikki brúktur, til sølu fyri 3.600 kr.
Tlf. 424232 ella 214232

Arbeiði

MÁLARAARBEIÐI VERÐUR GJØRT
Vilt tú hava húsið, bátin ella annað málað? Alt málaraarbeiði verður gjørt fyri ein sámuligan prís.
Tlf. 262057 ella 265044

HEY!
Er tað nakar, ið hevur brúk fyri eini 13 ára gamlari gentu at passa einum barni fyri seg aftaná skúlatíð. Helst í Runavík/Saltangará.
Tlf. 448343 ella 267151

ALT SNIKKARA-/TIMBURARBEIÐI
verður gjørt, skjótt og væl.S-timbur
Tlf. 441363, 214363, 210363

Barnaansing

25 ÁRA GOMUL KVINNA
ynskir at ansa børnum millum 0-2 ár. Eigi sjálv eina 6 ára gamla dóttir. Møguleiki er eisini fyri ansing um kvøldarnar. Um hettar ljóðar áhugavert, so ring
251319

Barnaútgerð

SCANDIA KLAPPVOGNUR
kromstell, myrkablátt betrekk, metalkurv undir, eitt lambaskinn, myrkablátt regnslag + myrkablá parasol selist alt samlað fyri 1.500,00 kr.
Tlf. 322850

BABYLIFT
Ein svart babylift til sølu fyri 600 kr. Bert brúkt til eitt barn. Sær gott út.
Tlf. 269329

BRIO KOYRISTÓLUR
í góðum standi til sølu fyri kr. 500,-
Tel: 567890

BABYLIFT
Vælhildin babylift 300 kr. Babygym (bleytt spælíteppi) 200 kr. Puslitaska (óbrúkt) 50 kr. Babybaðikar 50 kr. Seingjarkantur til tremmusong 50 kr.
Tlf. 318675

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Grønlittur koyristólur av merkinum Brio til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 316472 eftir kl. 18

BILBARNASTÓLUR
Britax Club Class extra frá 0-4 ár (ca. 18 kg.) 900,- Nýggj hoppigynga 200,-
Tlf. 320325 ella 251515

TIL SØLU
Barnavognur við lyft, hevur aluminium stell og lufthjól.
Tlf. 310013

Bátaútgerð

EITT
nýsmíðað 5-mannafar til sølu. Ring og hoyr nærri
tlf. 225585 ella 421674, Terje

HONDSNELLUR YNSKJAST
Er nakar, ið vil selja mær tvær hondsnellur bíliga.
Tlf. 443320 ella 223515

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, er eitt áttamannafar við fiskilyvvi til sølu. Motorurin krevur ábøtur.
Áhugað ringið 455322 ella 215322

SKANTI 3000
Ein Skanti 3000 VHF sum nýggjur til sølu.
Tlf. 318675

TIL SØLU
4 DNG 24v snellur til sølu.
Tlf. 226732

VÆLHILDIN
306 HK Volvo Penta Tamd 61A bátamotorur til sølu.
Tlf. 223765

Bingo

GOTT BINGO
verður í Gistingarhúsinum í Øravík sunnudagin 25. mai kl. 16.00. Høvuðsvinningur 2 x 500 kr. Hvørt bingo 300 kr. Eykaspæl verður eisini.
Suðuroyar Norðara Dansifelag

KAGGIN
Gott bingo verður fríggjakvøldið kl. 20.00. 15 vinningar á lutaseðli m.a. tvey gávukort á 2.000,- Eisini verður spælt bingola og 20 kr. spæl.
Kaggin

GOTT BINGO
verður í Tórshøll leygardagin 17. mai. 20 kr. spæl og bingola. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 17. mai kl. 15.00. Full pláta 500 kr. Á lutaseðli 2 x 1.000 kr. og eitt gávukort frá Smyril Line á 3.000 kr. Bingola. Eykaspæl. Koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

FRÁ EYDNUNI
Gott vingo verður sunnudagin 18. mai kl. 16.00. Full pláta 400 kr. Høvusvinningur: gávukort frá Smyril Line á 2.000 kr. Eykaspælið 1.400 kr. Drigið verður millum spelini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum 15. mai kl. 19. 15 plátur 100 kr. 6. og 12. spæl. Full pláta 600 kr. Á lutaseðli nógvir góðir vinningar, millum annað balja full av mati og 1 Apex ferðaseðil aftur og fram til DK. Millumspæl, eykaspæl, koyring heim.
AB-Studlar

GOTT BINGO
Gott bingo verður í Bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 18. mai kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli t.d. ferð fyri tvey til Noreg við Norrønu, 4 dekk við skifti, teoriskeið, lamb til heystar o.a.
Føroyskt cystisk fibrose felag

GOTT BINGO
Gott bingo verður í Glæmuni í Kvívík týsdagin 2. juni kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður í millum spølini. Høvusvinningur á lutaseðli gávukort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Burturm. /funnið

SKOPUN
Er tað nakar sum hevur funnið einar brillur uppi í Samljóð ella uttanfyri. Tær eru mistar leygardagin á møti í Aglow.
Tlf. 361366

SVARTUR FRENSUR
við hvítum labbum burturblivin úti í Vallalið, um nakar sær hann, so vinarliga ring
313720 ella 313520

ÍBÚÐ SØKIR Í HAVN ELLA NÆRHENDIS
Ungt par við einum barni søkir íbúð í Tórshavn ella bygdunum nærhendis. Roykja ikki og fara væk um.
Tlf. 318530

Býli

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
Par við einum barni søkir hús ella íbúð í høvuðsstaðnum ella bygdunum nærhendis. Vit roykja ikki.
Tlf. 318539

ÍBÚÐ/KAMAR YNSKIST
í KBH. Ung kvinna søkiríbúð/kamar í KBH ella umráðnum, frá ug. Farið væl um og gjaldi til tíðina. Alt hevur áhuga.
Tlf. 370404

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH
vit eru ungt par, sum fara at lesa í Keypmannahavn í heyst. Vit leita tí eftir hóskandi íbúð í KBH. Vit eru friðarlig, roykja ikki og fara væl um.
Ring 255049 eftir kl. 16

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar. Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki